

Bryggjaríið riggar, sum tað skal, og nú royna vit tappiútgerðina og skulu hava seinastu góðkenningarnar upp á pláss, sigur Wilhelm Petersen, stjóri á nýggja bryggjarínum, Okkara.

**MYND:** ÁLVUR HARALDSEN

## FAKTA WILHELM PETERSEN

**Navn:** Wilhelm Eyðunson Petersen
**Aldur:** 48
**Starv:** Stjóri í bryggjarínum Okkara
**Útbúgving:** Sivilverkfrøðingur, 1. part av HD og doktari í framleiðslutøkni
**Fyrrverandi størv:** Kredittleiðari í Føroya Sparikassa 1992-1998 og stjóri í Atlantic Petroleum 1998-2009.
**Onnur álitisstørv:** Nevndarformaður í Framtaksgrunninum 1999-2002 og framtaksfelagnum Notio 2002-2007 o.a.

sigur Wilhelm Petersen, sum tó ikki vil avdúka, hvussu stóran part av marknaðinum nýggja bryggjaríið ætlar sær at vinna.

### Sótu við blonkum arki

Fyri fráfarna oljustjóran er tað spennandi at standa á odda fyri nýggjari fyritøku, ið ætlar sær framá. Fyrrverandi hondbóltsspælaranum úr Vestmanna dámar nevniliga væl at bróta upp úr nýggjum, eins og hann fekk til uppgávu í 1998, tá Atlantic Petroleum fór til verka. Tann uppgávan var ikki bara einføld.

– Vit sótu tá við einum blonkum arki og skuldu fylla innihald í eina heilt nýggja fyritøku. Í fyrstani høvdu vit ongi loyvir og onga ítøkiliga ætlan, men so teknaðu túsundtals fólk partapening í felagnum, og vit keyptu okkum inn í loyvir í Bretlandi, so farast kundi undir framleiðslu. Seinni varð felagið so børsskrásett í Íslandi og Danmark. Í dag framleiðir felagið 3.000 tunnur um dagin í Chestnut og Ettrick og fær 80 dollarar fyri tunnuna. Tað kennist væl at hava verið við til at sett alt hetta í gongd, sigur Wilhelm Petersen.

Oljufepurin í Føroyum var høgur, tá Atlantic Petroleum varð stovnað. Mong droymdu ljósareyðar dreymar um oljumilliardir, og onkrir politikarar lovaðu, tá boðað varð frá oljufinningi undir Føroyum í 2001, at allir føroyingar skuldu fáa ein trivaligan oljukekk í part. Seinni eru tey flestu tó komin niður á jørðina aftur, tí enn spríkir olja ikki

> **Vit ætla at framleiða øll sløg av øli, pilsnara, gulløl og myrkt øl, og ymisk sløg av serøli**

í føroyskum øki í rakstrarverdum nøgdum.

– Eg havi allatíðina væntað, at tað kundu ganga fleiri ár, áðrenn olja varð funnin undir Føroyum í rakstrarverdum nøgdum. Tí var tað umráðandi fyri meg, at Atlantic Petroleum keypti seg inn í loyvir aðrastaðni, so felagið kundi fáa inntøkur burtur úr veruligari framleiðslu. Vit kundu kanska keypt loyvir í Noregi ella Danmark, men vit valdu Bretland, tí vit høvdu samstarv har frammanundan, sigur Wilhelm Petersen.

Støðan hjá Atlantic Petroleum var leingi góð, og eitt skifti var kursurin heilt uppi á 2400. Tá vóru glómur í eygunum á mongum partaeigarum. Nú er kursurin 160, og heldur minni verður reypað um keyp og sølu í felagnum. Fyri knøppum ári síðan, tá felagið fekk trupulleikar at gjalda stuttfreistaðu lánini aftur, løgdu fíggjarstovnarnir eisini upp í leikin. Freistirnar vórðu longdar, men meginparturin av gomlu nevndini varð skift út. Hetta var í juni. Í november fór so eisini stjórin.

### Eitt sindur sum Kall

Væntandi var tó ikki, at hann fór at ganga leingi fyri onki, tí aftrat tí at hava verið stjóri í Atlantic Petroleum í 11 ár hevur Wilhelm Petersen í fleiri ár verið nevndarformaður í Framtaksgrunninum og framtaksfelagnum Notio.

Í hesum sessunum fekst hann nógv við at fáa nýggj átøk at bera ávøkst, og eitt av átøkunum var telefonfelagið Kall, sum Framtaksgrunnurin setti pening í um aldarskiftið. Wilhelm Petersen heldur, at umstøðurnar hjá Okkara nú og Kalli tá líkjast.

– Støðan hjá bryggjarínum er ein analogi til støðuna hjá Kalli um aldarskiftið. Eitt monopol er á føroyska ølmarknaðinum í løtuni, og ein nýggj fyritøka er á veg. Á telemarknaðinum var eisini monopol, og ein nýggj fyritøka bjóðaði monopolinum av, vísir hann á.

Júst hetta heldur hann vera spennandi, tí nú hendir nakað nýtt, men hvussu leingi hann verður stjóri á nýggja bryggjarínum, veit hann ikki. Í fyrsta umfari hevur hann boðað eigarunum frá, at hann verður við, til alt riggar, sum tað skal.

Og tá hann verður spurdur, um hann framvegis fylgir við, hvussu gongst á oljufeltunum langt burturi frá nýuppsettu tangunum og transportbondunum á Velbastað, svarar hann játtandi og ivast ikki í, at Atlantic Petroleum er í góðum hondum.

– Gott fólk er í Atlantic Petroleum við nógvari kompetensu innan oljuvinnu, fíggjarvinnu og altjóða handilsskap, og tað kanst tú væl notera, sigur hann og peikar á blokkin.